# Sáttmáli

**millum**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**og**

**Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna**

## Um lønir v.m. hjá handverkarum, ið starvast hjá elfelagnum SEV

### § 1.

Hesin sáttmáli viðvíkur handverkarum, sum starvast hjá SEV, og er galdandi fyri handverkarar við sveinabrævi sum elektrikari og við øðrum sveinabrævi, sum verður mett at geva fullgóða eltekniska vitan, t.d. radiomekanikarar, jbr. tó § 2.

### § 2. Linjumenn/Montørar

Stk. 1. Handverkarar eftir § 1. sum hava arbeitt hjá elfelagnum í minsta lagi í eitt ½ ár og verða mettir egnaðir, kunnu verða útnevndir linjumenn/montørar. SEV kann í ávísum førum víkja frá hesi áseting.
Linjumenn/montørar verða løntir sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Handverkarafelag /Landsfelag Handverkaranna.

Stk. 2. Handverkarar við øðrum sveinabrævi, enn tey í § 1 tilskilaðu t.d. við handverksútbúgving innan bygging ella jarnsmíð, kunnu verða útnevndir linjumenn/montørar eftir hesum sáttmála aftan á í minsta lagi 3 ára arbeiði hjá SEV.
Tá umstøðurnar tala fyri tí, kann útnevningin gerast eftir styttri enn 3 ára arbeiði.

Stk. 3. Handverkarar sum kunnu koma undir stk. 1, men sum ikki eru settir sum linjumenn/montørar, verða løntir sambært galdandi tímaløn eftir sáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag. Sama er galdandi fyri handverkarar eftir stk. 2, tá talan er um fakliga relevant arbeiði.

### § 3. Tilkallivakt

Stk. 1. Tá linjumenn/montørar eftir nærri boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi skulu vera tøkir (á tilkallivakt), verður samsýningin hendan:

Stk. 2. Fyri tilkallivakt millum kl. 17:00 og kl. 24:00 verður latið vaktargjald 1 um tíman. Fyri tilkallivakt millum kl. 24:00 og kl. 07:00 verður latið vaktargjald 2. Fyri tilkallivakt í vikuskiftinum, fríggjadag kl. 17:00 til mánamorgun kl. 07:00, verður latið vaktargjald 2 um tíman.
Stk. 3. Vaktargjøldini eru í løtuni hesi:

**Vaktargjald pr. 1. oktober 2010**

| | |
|---|---|
| Vaktargjald 1: | kr. 22,00 |
| Vaktargjald 2: | kr. 44,01 |

Stk. 4. Tilkallivakt á sáttmálasettum frídøgum verður latið vaktargjald 2 um tíman.
Stk. 5. Fyri arbeiði undir tilkallivakt verður veitt yvirtíðargjald sambært sáttmálan.
Stk. 6. Vaktargjald og yvirtíðargjald kunnu ikki latast fyri somu tímar.
Stk. 7. Tá ið tilkallivakt er av slíkum slag, at tað er rímiligt at víkja frá omanfyri standandi, eitt nú lítið tyngjandi tilkallivaktir, verður samsýning avtalað serstakt.
Stk. 8. Um serstøk avtala verður gjørd um tilkallivakt á øðrum frídøgum enn nevnt er frammanfyri, verður sama gjald goldið, sum fyri sáttmálsettu frídagarnar.

## § 4. Kostskipan

Tá handverkari frá sínum fyrisetta í seinasta lagi dagin fyri fær at vita, at møguleiki ikki verður at fara til hús til døgurða sum vanligt, eigur viðkomandi sjálvur at skaffa sær mat. Tá tað ikki er so, og handverkarar verða sendir til arbeiðis fyrrapartin soleiðis, at møguleiki ikki verður at koma aftur til hús til døgurða, og hetta er vanlig skipan, skal elfelagið SEV lata teimum døgurða (dagsins rætt).

## § 5. Burturarbeiði

Linjumenn/montørar fáa ávíst eitt fast manningar- og uppmøtingarstað í hvørjum øki sær, og verður ferðatíðin frá hesum og út til tey ymisku arbeiðini roknað sum arbeiðstíð. Flutningur frá uppmøtingarstaði til arbeiðini kring um í økinum fer vanliga fram við arbeiðsbilum hjá SEV.
Fær linjumaður/montørur boð um (ella verður útlántur) at arbeiða uttanfyri hansara vanliga øki í avmarkað tíðarskeið, verður ferðatíðin ímillum vanliga uppmøtingarstaðið og nýggja uppmøtingarstaðið roknað sum arbeiðstíð.

## § 6. Fastlønarskipan

Handverkarar eftir hesum sáttmála, sum annars lúka krøvini í § 2 stk. 1 ella 2, kunnu eftir nærri avtalu koma í fastlønarskipan, tá innihaldið í starvinum so sum krøv til fakliga vitan sjálvstøðugt arbeiði og ábyrgd, harundir leiðsluábyrgd í ávísan mun, talar fyri tí. Fastlønarskipanin verður, sum ásett í hjálagda skjal I.

## § 7. Ìgildiskoma v.m.

Stk. 1. Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. oktober 2011 og verður galdandi til annar parturin sigur hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. oktober 2013.
Stk. 2. Sáttmálin er treytaður av góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Tórshavn, tann 30. mai 2012.

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið** **Føroya Handverkarafelag**

.

**Landsfelag Handverkaranna**

Skjal 1

# FASTLØNARSKIPAN FYRI MONTØRAR OG LEIÐANDI MONTØRAR Í TÆNASTU HJÁ SEV

## § 1. Setan

Henda skipan fevnir um montørar og leiðandi montørar, sum hava setanarbræv eftir hesari skipan, og sum eru umfataðir av § 1 og § 2, stk. 1 og 2 í sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna, um handverkarar sum starvast hjá elfelagnum SEV.

## § 2. Løn

Stk. 1. Lønin hjá montørum og leiðandi montørum er sum víst í hjáløgdu lønartalvum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna.

Stk. 2. Montørar eru handverkarar sum annars lúka treytirnar í § 2 stk. 1 ella 2 í sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Handverkarafelag /Landsfelag Handverkaranna.
Fyri at verða útnevndur leiðandi montørur skal viðkomandi hava leiðsluábyrgd av minst einum persóni.

Stk. 3. Teir, sum nú eru undir fastlønarskipan hjá SEV, verða innplaseraðir í hendan sáttmála soleiðis, at teir ikki fara niður í løn.

## § 3. Arbeiðstíð

Tann í § 2 ásetta mánaðarlønin er fyri fult dagsarbeiði, sum telur 40 tímar um vikuna. Mattíðin verður løgd eftir avtalu við rakstrarleiðaran, alt eftir um arbeitt verður heima ella burturi. Arbeiðstíðin eigur, har tað letur seg gera, at verða løgd soleiðis, at leygardagur verður frídagur.

## § 4. Tilkallivakt

Í tíðarskeiðum, tá SEV metir tað neyðugt, verður tilkallivaktarskipan tikin í brúk.
Endurgjald fyri tilkallivakt verður sambært § 3 í sáttmálanum millum partarnar.

## § 5. Kostskipan

Tá montørar frá sínum fyrisetta í seinasta lagi dagin fyri fáa at vita, at møguleiki ikki verður at fara til hús til døgurða sum vanligt, eigur viðkomandi sjálvur at skaffa sær mat. Tá tað ikki er so, og montørar verða sendir til arbeiðis fyrrapartin soleiðis, at møguleiki ikki verður at koma aftur til hús til døgurða, og hetta er vanlig skipan, skal elfelagið SEV lata montørunum døgurða (dagsins rætt).

## § 6. Fastir frídagar

Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagurin, hvítusunnuaftan, ½ grundlógardagur, ½ Ólavsøkuaftan, Ólavsøkudagur umframt allir halgidagar eru frídagar.

## § 7. Víðari útbúgving

Tá montørar luttaka ein heilan dag í skeiðvirksemi, sum er fyriskipað av elfelagnum, verður hvør skeiðsdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 8 tímar. Um skeiðsdagurin er longri enn 8 tímar, verður avroknað tíma fyri tíma, antin sum tímaløn ella avspáking.

## § 8. Tímaløn

Tímalønin er árslønin býtt við 2080 (40*52)

## § 9. Úrtíðarløn

Úrtíðararbeiði eigur helst ikki at vera.
Fyri álagt úrtíðararbeiði verður úrtíðarløn roknað soleiðis:

Fyri 1., 2. og 3. tíman verður goldið 50%.
Fyri 4. og fylgjandi yvirtímar og fyri arbeiði leygardagar, sunnudagar og fyri teir í § 6 nevndu frídagar 100%.

Um tað er gjørligt, eigur at verða sagt frá úrtíðararbeiði dagin fyri.

## § 10. Frítíðarreglur

Viðv. frítíð verður víst til løgtingslóg um frítíð við løn.

## § 11. Uppsøgn, sjúkraløn og eftirsituløn

Stk. 1. Uppsøgn, sjúkraløn og eftirsituløn verður samb. galdandi løgtingslóg um starvsmenn, tó soleiðis, at eftirsituløn verður goldin í mun til uppsagnartíðina hjá viðkomandi handverkara, t.e. minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir.
Stk. 2. Handverkari kann fáa frí við løn, tá ið barn hansara er sjúkt, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hevur handverkari meira enn 2 børn undir 10 ár, kann hann fáa frí í upp til 20 dagar.

## § 12. Eftirløn

Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið, sum er 15,0 %

Tórshavn, tann 30. mai 2012

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**Føroya Handverkarafelag**

**Landsfelag Handverkaranna**